inni - trygt og ómaksleyst til hús www.inni.fo



# Hús í Norðragøtu

## Snøgg arkitektteknað hús í Norðragøtu











## Alt er gjørt á besta hátt – bæði innan og uttan. Húsini eru sera snotulig - sterkt og væl bygd.

**Fyrsta fatanin**
Fyrsta fatanin er, at í hesi gøtuni standa eini hús, sum eru heilt serlig. Grannalagið er hugnaligt og grannarnir eru blíðir og fyrikomandi.

**Húsini**
Húsini eru bert 6 ára gomul í góðum standi, dygdin er avbera góð. Húsini eru nakað fyri seg og sera spennandi.
Stór terassa er sunnafyri húsini. Eisini er terassa út frá stovuni, eftir allari niðaru síðu.

**Ljós og luft**
Húsini standa væl og frítt fyri. Vakurt útsýni er oman millum húsini , út á víkina og niðan í fjøllini. Tú kennir teg ongantíð innibyrgdan, vindeygini er stór og tað kemur sera nógv ljós inn.

**Stílur og snið - inni og úti**
Stílurin er ráður, nýtýmans og serligur, men tó lættur og ljósur. Opið er upp í tróðrið, og tað er vítt til veggja Nógv og stór vindeygu eru og útsýnið er gott. Opni stílurin innan ger, at tú hevur gott samband við umhvørvið uttan, men hóast tað, er tað sera fjálgt inni hjá tær sjálvum.

**Garagan**
Stór garaga er føst í húsinum, tú kanst ganga beinleiðis út í garaguna úr fýrrúminum.

## Fakta:

Snotiligu arkitektteknaðu húsini eru í 2 hæddum. Ovara hæddin er 164m$^2$ og niðara hæddin er 40m$^2$. Hartil er garasja á 36 m$^2$ – í alt 240 m$^2$. Í ovaru hædd, sum er býtt upp í 2 partar, er inngongd, durur, køkur / stova, sjónvarpsstova, wc, 2 kømur, arbeiðsrúm, hjúnarrúm við egnum baðirúmi og trappa til niðaru hædd. Eisini er stórt útigólv. Í niðaru hædd er gongd, kamar, baðirúm, bryggers / fýrrúm og haðani inngongd til garasjuna. Húsini eru smíða úr sibiriskum lerki, hava aluvindeygu við herðaðum glasi uttan, og takið er Icopal. Húsini standa í friðarligum, og barnavinaligum umhvørvi og hava sera gott útsýni. Stutt er til allar hentleikar. Húsini eru mest sum viðlíkahaldsfrí.



inni

P/F Inni | Niels Finsens Gøta 37 | P.O. Boks 364 | FO-110 Tórshavn | inni@inni.fo | Tlf. 320 410 | Fax 320 510